# FRÁGREIÐING FRÁ STÝRINUM

# UM

# FELAGSINS VIRKSEMI SÍÐANI

# ÁRSFUNDIN

**November 2008**

# Frágreiðing frá stýrinum til umboðsnevndina á heystfundinum 21. november 2008

Stýrið lýsir í hesi frágreiðingini tey mál hjá SEV, sum stýrið metir hava størsta áhuga hjá umboðsnevndini, og frágreiðingin verður latin nevndini sambært grein 4, stk. 12a í viðtøkunum.

**Elveitingarlógin**

Samsvarandi nýggju lógini um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni eru ávísar nýggjar treytir settar til virksemi okkara, sum skulu vera uppfyltar tann 1. januar 2009. Arbeiðið hesum viðvíkjandi er í gongd, og fevnir hetta m.a. um sundurskiljing av roknskaparviðurskiftunum hjá net- og framleiðsluvirkseminum, loyvir til net- og framleiðsluvirksemi, virðisásetingin av ognunum, avskrivingar av ognunum og reglur fyri prísáseting.

Tosað hevur eisini verið um onnur viðurskifti, serliga um hvussu útbjóðing skal gerast fyri komandi útbyggingar av vindorkupartinum. Enn er mannagongdin tó ikki fastløgd.

Nýggja lógin staðfestir, at landið er evsti myndugleiki á hesum økinum. Ásannandi hetta tók SEV stig til at fáa nýggju landsstýriskvinnuna á økinum, Bjørt Samuelsen á kunnandi vitjan hjá felagnum. Fundurin var tann 24. juni, og fyri SEV luttóku stýrið og leiðslan.

**Viðtøkubroytingar**

Í nýggju viðtøkunum, sum koma í gildi 1. januar 2009, er tann broyting hend, at kommunurnar gevast at borga fyri rakstri og skuld hjá SEV. Hetta hevur viðført, at teir lánistovnar, sum standa fyri verandi lángeving til felagið, skulu hava endurnýggjað treytir sínar. Hesum hava teir játtað, og arbeitt verður við, at teir frameftir fáa pant í ognunum hjá SEV.

Eisini hevur verið arbeitt við spurninginum, um SEV eftir nýggju viðtøkunum skal gjalda skatt. TAKS hevur svarað, at eftir broytingina verður SEV skattskyldugt, hetta tí at borganarskyldan nú dettur burtur, og tí kann virki felagsins ikki meira javnstillast við kommunalan rakstur. Í praksis fer tó neyvan nøkur skattgjalding at fara fram, tí skattliga avskrivingargrundarlagið er sera stórt.

**Starvsfólkaviðurskiftir**

Tann 25. juni gjørdi Kommunala Arbeiðsgevarafelagið vegna SEV nýggjan sáttmála við Maskinmeistarafelagið sum er galdandi til 1. oktober 2010. Tvey umboð fyri SEV luttóku í samráðingunum. Í semjuni bleiv fastlagt, at lønartalvan hjá maskinmeistarunum hjá SEV verður javnsett við ta hjá maskinmeistarunum hjá landinum.

Síðani ársbyrjan hevur verið arbeitt við at endurskoða bygnaðin hjá felagnum. Hetta hevur fevnt um umsiting, framleiðslu og rakstur. Eitt úrslit av hesum hevur verið, at í vár gavst deildarstjórin innan framleiðslu. Fyribils hava Finn Jakobsen og Anders Nedergaard-Hansen røkt starvið. Arbeiðið við nýggja bygnaðinum er um at verða liðugt, og verður hetta sett í verk eftir 1. januar 2009.

Í bygnaðinum hjá SEV eru m.a. tvey nýggj størv skipað. Fyrra starvið er innan samskifti, meðan seinna er innan heilsu-, trygdar- og umhvørvisuppgávur. Bæði størvini hanga saman við nýggju krøvini, sum samtíðin setur til felagið.

Í nøkur ár hevur SEV havt avtalu við uttanhýsis ráðgeva innan samskifti, men uppgávan er nú blivin so umfevnandi, at betur er at hava fólk í starvi, sum tekur sær av hesum. Uppgávur innan heilsu, trygd og umhvørvi eru eisini vaksandi í samfelagnum, og hevur hetta stóra ávirkan á umdømið hjá fyritøkum. Fyri stór og samansett virkir sum SEV er tí neyðugt við hollum førleikum á hesum økinum. Bæði størvini eru at rokna sum stápsfunktiónir og hava tilvísing til stjóran.

Annika F. Berg byrjaði 1. november sum HTU-leiðari, meðan Leivur Hansen byrjar sum samskiftisleiðari beint eftir ársskiftið. Starvsetanin av samskiftisleiðaranum bleiv sera drúgv, tí stýrisformaðurin var millum umsøkjararnar, og harvið blivu fleiri av teimum, sum skuldu viðgera starvssetanina, ógegnig. Men uppgávan bleiv loyst eftir reglunum, og frágreiðing var eisini skrivað um gongdina í málinum í sambandi við spurningar um alment innlit v.m.

Tveir verkfrøðingar eru settir í starv. Magni Simonsen byrjaði sum sterkstreymsverkfrøðingur 25. september, og Magnus Magnussen byrjaði sum maskinverkfrøðingur 20. oktober.

Stýrið hevur staðfest vanligu siðvenjuna, at deildarstjórin John P. Danielsen røkir uppgávurnar hjá stjóranum, tá ið hesin er burturstaddur.

## Varandi orka

Yvirskipaði orkupolitikkurin hjá landinum ásetur, at í 2015 skulu í minsta lagi 20 % av orkuframleiðsluni á landi stava frá varandi orkukeldum. Stýrið hevur samsvarandi hesum ásett, at hjá SEV skal tann parturin av framleiðsluni, sum stavar frá varandi orkukeldum, økjast úr verandi 45 % til 55 % í 2015, samstundis sum hædd eisini verður tikin fyri, at elnýtslan veksur í nevnda tíðarskeiði.

Útbyggingar við verkum, sum gera brúk av teimum varandi orkukeldunum, eru ógvuliga týðandi partur av framtíðini hjá okkum øllum. Fleiri góðar grundir eru fyri hesum, og skulu her nevnast nakrar. Høgu og óstøðugu oljuprísirnir eru ein støðug hóttan ímóti búskapi okkara, veitingartrygd okkara er bundin at oljuveiting, og $CO_2$ útlátið skal minkast sum mest og sum skjótast.

Í hesum sambandi hava stýrið og leiðslan arbeitt við at gera eina 10 ára ætlan, sum skal leggja kósina og sum skal tryggja, at málsetningurin verður rokkin. Í dag fyriliggur hendan ætlan í prentaðum líki, og er gjøgnumgongd av henni við sum serstakt punkt á fundarskránni til heystfundin hjá umboðsnevndini.

Vinnuhúsið og Bitland skipaðu fyri ráðstevnuni Trans Atlantic Climate Conference í apríl mánaða, har fyrrverandi amerikanski varaforsetin, Al Gore, var høvuðsrøðari. SEV var millum stuðlarnar, sum vóru við til at gera hetta tiltak møguligt. Á ráðstevnuni varð dentur lagdur á, at vit eiga øll at fara væl um umhvørvið, og er hetta í samsvari við endamálsorðingina hjá SEV.

## Útbygging av vatnorku

Norðrari parturin av verkætlanin Eiði II er í gerð. Tunnilin verður 2,6 km langur, og er støðan í løtuni soleiðis, at uml. triðingurin er sprongdur. Serliga krevjandi varð uppgávan at spreingja tann partin av tunlinum, sum gekk undir Norðskálatunlinum, og eydnaðist hetta væl. Væntandi verður hendan útbygging klár at taka í nýtslu í september næsta ár, og fer hetta at økja um ársframleiðsluna við uml. 4,5 mió. kWh. Hendan arbeiðstøkan er eisini ein fyrireiking og fyritreyt fyri at kunna halda á fram við útbygging av sunnara partinum, sum vil geva eina ársframleiðslu uppá 13 mió. kWh.

Arbeiðið at gera inntøkini varð boðið út sum serskild uppgáva, og verður sáttmáli gjørdur við Kanjon um hetta.

Viðvíkjandi sunnara parti av Eiði II verkætlanini er støðan tann, at Yvirfriðingarnevndin í løtuni viðgerð, hvørt loyvi skal gevast til hetta ella ikki. Í mai mánaða varð Náttúrugripasavnið ligðugt við støðulýsing og árinskanning av djóra- og plantulívinum í økinum, og er hetta tilfar partur av viðgerðini í málinum.

Verður loyvi givið til sunnara partin av Eiði II, so skal eisini byggjast út á elverkinum á Eiði. Framleiðsluhøllin skal víðkast, og ein triðja turbina verður monterað.

Í omanfyri nevndu 10 ára ætlan verður mælt til, at útbygt verður við vatnorkuverki í Norðurstreymoy sum skjótast. Ætlanin inniheldur eina vatnbyrging við Víkavatn. Avsettar eru 1,0 mió. kr. til forkanningar í 2009, og verður her serliga hugsað um at seta umhvørviskanningar í verk til tess at sleppa undan at missa tíð í sambandi við eina loyvisviðgerð.

## Vindorka

Sambært viðmerkingunum til elveitingarlógina skal útbygging við vindorku bjóðast út, soleiðis at veitarar kunnu kappast um loyvini, og myndugleikin á økinum skal ráðføra seg við SEV í sambandi við slíka útbjóðing.

Verandi 7 myllur, sum framleiða inn á netið hjá SEV, koyra frítt, soleiðis at skilja, at alt sum tær framleiða, verður koyrt inn á netið. Frameftir er umráðandi at gera ásetingar í treytunum fyri vindorkuframleiðslu, soleiðis at hædd verður tikin fyri, hvat elnetið klárar, samstundis sum hædd verður tikin fyri, at støðug menning hendir innan hesa framleiðslugreinina.

Avbjóðingin er at temja eina óstøðuga orkukeldu, soleiðis sum vindurin í sínari náttúru er, og at fáa orkuna til høldar á elnetinum við øllum teimum góðsku- og trygdarásetingum, sum elveitingaruppgávan ásetur.

SEV fyrireikar seg til at bjóða, tá ið fyrsta útbjóðing fer fram. Stýrið fekk á seinasta várfundinum heimild frá umboðsnevndini at skipa hendan partin í sjálvstøðugt partafelag, um tað gerst neyðugt. Eisini verður arbeitt við at tryggja sær skjótar veitingar av myllum, við tað at mylluframleiðarar hava sera langar veitingartíðir. Arbeitt verður somuleiðis eisini við at gera leiguavtalur og at fáa byggiloyvir til fleiri myllur í Neshaganum.

Fyrr í heyst kom Jane Petersen frá Dong Energy á vitjan, og helt hon í tí sambandinum ein fyrilestur í Norðurlandahúsinum við høvuðsdenti á, hvussu el-bilar verða ein partur av framtíðar elkervinum - og arbeiða tey serliga við, hvussu hetta kann økja um vindorku framleiðsluna. Fyrilesturin var væleydnaður. SEV fylgir væl við í gongdini í donsku verkætlanini.

Forkanningarnar til sonevndu Nólsoyarverkætlanina hjá Jarðfeingi vóru lidnar fyrr í heyst. Upp á fyrispurning um luttøku í at fremja verkætlanina, svaraði SEV, at vit kundu taka okkum av vindmyllupartinum og øllum tí, sum hevði við elveiting at gera, meðan vit ikki vildu blanda okkum uppí hitapumpu- ella vetnispartin.

Kanningarstovnurin Risø er nú komin við einari fyribils frágreiðing um, hvussu nógv av vindorkuframleiðslu kann latast inn á elkervið. Jarðfeingi er eigari av hesum arbeiði. Enn hava hvørki SEV ella Jarðfeingi gjørt sínar viðmerkingar til frágreiðingina, men verður hetta gjørt í nærmastu framtíð. Síðani ganga vit út frá, at frágreiðingin verður almannakunngjørd.

Vitjað hevur verið á Risø í Roskilde, har hugt var at sera áhugaverdari battarískipan, har hon verður brúkt saman við vindframleiðslu. Kannað verður í løtuni um hendan skipanin kann brúkast í Koltri ella á aðrari útoyggj, men á tann hátt, at battaríið verður sett saman við verandi motorframleiðslueindini. Á hendan hátt fæst nógv betur rakstur, og fer hetta eisini at økja munandi um livitíðina á motorinum.

## Alduorka

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við royndarverkætlan at fáa elframleiðslu burturúr alduorku. Hetta er farið fram í P/F SeWave, har SEV eigur 50 % og skotska felagið Wavegen eigur hini 50 %'ini.

Fyrsti partur av samlaðu verkætlanini er mettur til uml. 40 mió kr., og harav hevur ES játtað 10,2 mió. kr., treytað av, at samlaða fíggingin samstundis er tøk. Í hesum sambandi hevur SeWave søkt Føroya Landsstýri um at luttaka og stuðla verkætlanini. Á fíggjarlógini fyri 2008 hevur Løgtingið sett av 300 t. kr. sum stuðul til verkætlanina.

Seinnu tíðina er tó stígur komin í samstarvið ímillum partaeigararnar, og hevur støðan verið fastlæst eina tíð. Nú verður arbeitt fram ímóti at fáa Wavegen burturúr felagnum, fyri síðani at finna annan turbinuveitara, sum kann framleiða slíkar turbinur.

Aðrir aktørar innan alduorku vísa verkætlanini áhuga, og verður kannað, hvussu royndarverkætlanin kann halda áfram. Stýrið hevur tryggjað sær, at felagið framleggur

eina heildarloysn, áðrenn støða verður tikin til, í hvønn mun SEV framhaldandi skal luttaka í tí broyttu royndarverkætlanini.

## Fjarhiti

Arbeiðið at knýta Sundsverkið í fjarhitakervið gongur eftir ætlan, og væntandi verður íbundið í januar mánaða næsta ár. Hetta hevur við sær, at effektiviteturin á verkinum økist, og tað er til fyrimuns fyri umhvørvið.

Avtala verður gjørd millum SEV og P/F Fjarhitafelagið um leigu- og veitingarviðurskiftini. Samlaða íløgan hjá SEV av samanbindingini verður umleið 3 mió. kr.

## Framleiðsla og rakstur

Framleiðslan av el - og broytingarnar í henni - siga nógv um búskaparligu gongdina í samfelagnum. Niðanfyri er talva, sum vísir broytingina í samlaðu elframleiðsluni fyri seinastu fýra árini.




Við hesari mynd í huga roknar SEV við, at framleiðslan stendur í stað komandi ár.

Oljuprísurin hevur sett sín serliga dám á framleiðslukostnaðin í ár. Roknað varð við einum meðalprísi uppá 2.555 kr./tons í fíggjarætlanini, men longu í juli mánaða var prísurin komin uppá uml. 3.500 kr./tons. Fylgt varð neyvt við gongdini, og um hetta mundi varð umhugsað at hækka elprísin. Síðani tá hevur prísgongdin tíbetur gingið hinvegin, og rokna vit við, at samlaði kostnaðurin fyri olju í árinum verður einar 110

mió. kr., meðan tað í fíggjarætlanini eru avsettar 103 mió. kr. til oljukeyp. Annars verður í hesum sambandi víst til frágreiðing um fíggjargongd felagsins, sum eisini verður framløgd í dag.

Oljusáttmálin verður bjóðaður út millum føroysku oljusølurnar við jøvnum millumbilum, og kemur hetta væntandi fyri aftur um ársskiftið.

Í august mánaða varð nýggjur sjókaðal lagdur millum Skopun og Kirkjubø. Kaðalin var framleiddur í Italia, og eitt svenskt kaðalskip stóð fyri útleggingini. Arbeiðið gekk sera væl, og var høvið eisini nýtt til at taka upp gamlar kaðalar millum Haldarsvík og Eiði, um Trongisvágsfjørð og gamalt luftspenn um Leirvíksfjørð. Kaðalar blivu somuleiðis eisini lagdir út um Kaldbaksfjørð, millum Haldarsvík og Eiði, um Funningsfjørð og um Trongisvágsfjørð. Alt hetta hevur borið til innan fyri ta í fíggjarætlanini avsettu upphæddina.

Eftir at nýggi kaðalin var settur í rakstur, vórðu motorarnir á Skopunarverkinum steðgaðir. Teir hava koyrt síðani gamli sjókaðalin fór, og verða teir í løtuni yvirhálaðir.

Endurnýggingin av stýriskipanini til M4 og M5 á Sundsverkinum gongur eftir ætlan. M4 verður væntandi klárur at taka í nýtslu aftur um ársskiftið, síðani verður farið undir M5, og verður hann tøkur aftur komandi summar.

Á Sundsverkinum verður í løtuni innførd umhvørvisstýriskipan eftir ISO14001 leistinum, og verður hetta eftir ætlanini liðugt í ár. Skipanin skal eisini góðkennast (certificerast), og tá ið tað er gjørt, skal líknandi arbeiði gerast á Vágsverkinum.

Endurnýggingin av oljugoymsluni í Vági er so gott sum liðug, arbeitt verður við teimum seinastu smálutunum júst nú, og skal endalig góðkenning fyriliggja, áðrenn olja næstu ferð verður skipað upp til Vágsverkið. Enn hongur tó eftir, at SEV og IRF ikki eru samd um avrokning at tí tilfarinum, sum varð koyrt frá verkinum til tyrvingarstøðina í Trøllavík. Feløgini eru í tingingum, og vóna at kunna loysa hetta við semju.

Á Sundsverkinum eru tangarnir kannaðir, og vísti hetta, at neyðugt var við umvælingum. Hesar fara fram í løtuni, og fevnir hetta í høvuðsheitum um nýggjar tangabotnar á gassolju- og minna fueloljutanganum. Eisini hevur verið neyðugt at skifta tangatoppin á sama fueloljutanga. Umvælingin fer at kosta umleið 6,6 mió. kr.

Tórshavn 21. november 2008

Stýrið fyri SEV